# Vit skulu framvegis liva hvør sítt lív

**Grønland og Føroyar eru tvey ymisk samfeløg, sum liva hvør sítt lív, og tí eiga vit at halda fram við. Eisini í sjálvstýrismálinum, sigur grønlendskur landsstýrismaður, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum**

VITJAN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Sjálvstýristilgongdin í Føroyum og í Grønlandi eru tvey ymisk mál, sum hava hvørt sítt lív, og tað skulu vit halda fast um, sigur Jørgen Wæver Johansen, grønlendskur landsstýrismaður við millum øðrum sjálvstýrismálum.

Føroysk og grønlendsk viðurskifti eru ikki tey somu, og eg eri vísur í, at blanda vit ikki tingini saman, náa vit nokk at enda hvør sínum úrsliti, sum er tað besta hjá hvørjum landi sær, heldur hann.

Tað er einki at ivast í, at froyingar kunnu náa einum úrsliti, sum er tað besta, ið fáast kann fyri Føroyar. Men tað merkir ikki av sær sjálvum, at tað eisini er best fyri Grønland. Tí eiga vit hvør í sínum lagi at arbeiða við tí, sum best er fyri okkara egna samfelag og ikki blanda tingini saman.

Jørgen Wæver Johansen er við í stóra grønlendska ferðalagnum, sum týsmorgunin kom til Føroya sum gestir hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag at kunna seg um ymisk føroysk samfelagsviðurskifti.

– Tað er fyri at fáa nýggjan íblástur, at vit koma hendanveg, sigur Jørgen Wæver Johansen, sum heldur, at skráin, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur lagt fyri vitjanina, borgar fyri, at tey kunnu fáa nøkur áhugaverd ting heim aftur við til Grønlands.

Millum annað er hann áhugaður í at hoyra um, hvussu føroyingar arbeiða við búskaparmálum og eitt nú privatiseringum av almennum fyritøkum

Umframt at umsita sjálvstýrismál, er Jørgen Wæver Johansen er eisini landsstýrismaður við orkumálum. Hann greiðir frá, at eitt útbjóðingarumfar er í gongd í samband við oljuleiting undir Vesturgrønlandi, og at úrslitið fyriliggur tann fyrsta oktober í ár.

Hann vónar, sigur landsstýrismaðurin, at tað verður líka stórur áhugi fyria t sleppa at leita eftir olju í Grønlandi, sum tað er í Føroyum.



*Jørgen Wæver Johansen, grønlendskur landsstýrismaður, sigur, at føroyingar og grønlendingar eiga ikki at blanda sjálvstýrismálini hjá hvørjum øðrum saman*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Grønlendingar á kunningarferð

**Ein stór grønlendsk sendinevnd vitjar komandi dagarnar í Føroyum. Ferðalagið telur umleið 40 fólk, og Føroya Arbeiðsgevarafelag er vertur í Føroyum**

VITJAN
*Edvard Joensen*

Grønlendska ferðalagið kom í Vágar fyrrapartin týsdagin, og fór beinanveg á vitjan hjá Atlantsflogi. Síðan varð farið til Havnar, har fleiri vitjanir skuldu vera, eins og vitjað verður ymsastaðni kring landið. Bæði hjá virkjum og fyritøkum. Eisini verða ymsir fyrilestrar umframt okkurt undirhald á skránni hjá vitjandi grønleningunum.

Við í grønlendska ferðalagnum eru bæði politikarar, embætisfólk og vinnulívsfólk, sum fara at kunna seg um ymisk vinnulig og politisk viðurskifti í Føroyum.

Millum luttakararnar eru landsstýrismaðurin við rávevnis- sjálvsstýris- og lógarmálum, Jørgen Wæver Johansen, og fólkatingsmaðurin Lars Emil Johansen.

Tey fara at tosa við føroyskar myndugleikar og onnur um mál sum privatisering, fíggjarmál, infrastruktur, arbeiðsmarknaðarmál, útbúgving og sjálvstýrismál.

Ferðalagið verður í Føroyum í døgunum 17. til 20. august. Flestu tiltøkini á vitjanini fara fram í Havn, eftir at vitjað er hjá Atlantsflogi á flogvøllinum í Vágum.

Seinasta dagin verður farið í Eysturoynna, har vitjað verður hjá ymsum vinnufyritøkum.



*Á vitjanini í Føroyum fer grønlendska sendinevndin eiisni at vitja virkið hjá Aðalstein Anthoniussen, sum hevur selt fleiri AWI bátar til Grønlands*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Kærir TV2 til Pressenævnet

**Óli Jacobsen hevur mist tolið við TV2 og fer nú at kæra sjónvarpsstøðina til danska Pressenævnet fyri drál**

KÆRA
*Edvard Joensen*

Nú er nokk, sigur Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafleag, sum nú á fjórðu viku bíðar eftir svari frá TV2 upp á kæru, hann sendi støðini um eitt innslag um føroyskar fiskimenn, sum TV2 sendi herfyri.

– Eg metti í kæruni, at tvær vikur mundu vera nóg long tíð at avgreiða hana. Men nú gongur á fjórðu viku, og einki svar er komið enn, sigur Óli Jacobsen. Okkum varð lovað eitt svar fríggjadagin í seinastu viku, men tað kom ikki. Síðan skuldi tað koma mánadagin. Men mánadagin kom bert eitt faks, sum segði, at svarið skuldi koma ...»i løbet af dagen«.

Men alt segði tað, sama, og týsmorgunin segði Óli Jacobsen við Sosialin, at hann fór at boða TV2 frá, at tey kundu spara sær at gera nakað meira, tí nú kærdi hann sjónvarpsstøðina til Pressenævnet fyri viðgerðina av hesum máli.

– Halda tey, at tey við at draga málið út, fara at fáa okkum at gloyma tað, kenna tey ikki meg, sigur hann

Óli Jacobsen sigur, at tað er sera sjáldan at síggja ella lesa ein tíðindastubba, sum hevur so lítið hald í veruleikanum, sum hesin í TV2 hevði.

– Har var stutt sagt einki, sum passaði, sigur hann. Um lítið skil er í, plagar vanliga okkurt at vera, sum er rætt, men so var ikki her, sigur Fiskimannafelagsformaðurin.

Hann sigur, at hann, síðan kæran varð send, er komin eftir, at hann í grundini hevur verið ov lagaligur í síni orðing.

Tað er soleiðis, greiðir Óli jacobsen frá, at danskir fiskimenn hava tvær skipanir, tá tosað verður um ískoyti og frádráttir.

Fyri at gera eina langa søgu stutta, er veruleikin so tann, at heili 93% av føroyskum fiskimonnum hava verri skipan, enn teir donsku fiskimenninir hava. Her tosa vit um menn við teimum stóru skipunum, sum innslagið í TV2 var um.

Óli Jacobsen leggur afturat, at tað, sum kanska er mest harmiligt í hesum máli er, at upprunin til alt hetta er føroyskur. Nevniliga tað, sum formaðurin í Búskaparráðnum segði á ráðstevnuni um blokkin, sum hildin varð á Christiansborg herfyri.

– Bæði føroyski embætismaðurin og danska sjónvarpsstøðin hava gjørt ein feil, sigur Óli jacobsen. Men hvørgin parturin er so frægt at sær komin, at tey klára at viðganga tað. Tí er hendan støðan, sum nú er, íkomin, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag.



*Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, ætlar sær ikki at lata TV2 sleppa at doyggja í syndini*



# Meira samstarv millum pedagogar og lærarar

**Fríggjadagin skipaði felagið Synergi fyri fakfestivali um frítíðarskúlapedagogik. Fleiri fyrilestrar vóru á skránni og móti endanum av degnum eitt pallborðskjak, har politikarar, umboð fyri lærarafelagið og pedagogar luttóku. Har kom millum annað fram, at lærarafelagið og pedagogfelagið hava gjørt av at samstarva meira**

FAKFESTIVALUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fakfestivalurin um pedagogikk á frítíðarskúlunum varð hildin á Sjómansskúlanum í Havn fríggjadagin. Gott 100 luttakarar vóru, og fingu tey ein sera áhugaverdan og spennandi dag, har fyrilestarnir spentu so víða sum frá Hvat er frítíð í nútímans samfelagnum til pedagog og lærarasamstarv, og frá broytingum í samfelagnum seinastu 40-50 árini til hvørji virði vit leggja í okkara børn.

Kanska serliga hetta seinna er áhugavert, tí sum er, er samstarvið millum lærarar og pedagogar ikki serliga sjónligt í Føroyum. Men sum skilst eru ætlanir frammi fyri at bøta um tað.

Hetta kom eisini seinni fram undir pallborðskjakinum.



*115 luttakarar vóru á fakfestivalinum um frítíðarskúlapedagogikk*

*Mynd: Maria Olsen*

### Samstarv

Eitt kjak, sum er nakað gamalt eftirhondini, er kjakið um í hvønn mun lærarar og pedagogar skulu samstarva. Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Føroya pedagogfelag segði millum annað í sínum uppleggi við pallborðið, at samstarv er millum feløgini, men tað er bara ikki vorðið so sjónligt enn.

– Bæði feløgini hava avgjørt at samstarva meira, serliga á hesum økinum, sum vit tosa um í dag, segði Jarvin millum annað.

Hann legði tó afturat, at fyrsta treytin fyri tí er, at partarnir setast niður og skilgreina leiklutin hjá sær. Hann nevndi eisini, at tá hann í 1994 gekk á pedagogútbúgvingini, var ein sokallaður kombi-pedagog og lærarafIokkur. Hetta eydnaðist sambært Jarvini stak væl, og øll vóru vælnøgd við tað.

– Tíverri datt tað niðurfyri aftur, og varð einans tað eina árið, segði hann.

Jóhannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelag kom inn á, at tað mugu greiðar reglur til fyri hetta økið.

– Lyklaorðini í einum samstarvi millum lærarar og pedagogar á hesum økinum eru greiðar reglur og virðing fyri hvørjum øðrum. Hava vit tað, so eri eg vísur í, at tað ikki verður nakar stórvegis trupulleiki við einum samstarvi, segði formaður lærarafelags millum annað á pallborðsfundinum.




*Formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin Feilberg Hansen, segði millum annað á pallborðsfundinum, at bæði lærarafelagið og pedagogfelagið hava avgjørt at samstarva meira – serliga á frítíðarskúlaøkinum*

*Mynd: Maria Olsen*

### Fýra fyrilestrar

Ein av fyrilestrarhaldarunum fyrr um dagin var danin Stig G. Lund. Hann helt fyrilestur um nútímans frítíð og frítíðarpedagogikk. Eisini tosaði hann nógv um samstarv millum lærarar og pedagogar.

Hann tosaði um hetta, at pedagogar eru í vanda fyri at enda sum talvuvaskarar, men hann helt, at um fokus verður til dømis sett á verkstaðararbeiði, so ber betur til at fáa eitt samstarv millum hesar báðar bólkarnar upp á beinini.

Tá Stig G. Lund var liðugur, var ein lítil steðgur, har fólk fingu ein kaffimunn og kundu fara út at njóta tað góða veðrið eina løtu. Yvirhøvur lat til, at fólk vóru stak vælnøgd og hildu, at danin hevði tosað um nógv spennandi og áhugaverd viðurskifti.

Hini trý, sum hildu fyrilestur, vóru Rógvi Thomsen, undirvísir í pedagogikki á Føroya Læraraskúla, Hans Mourits Foldbo, undirvísir í sálarfrøði á Føroya Læraraskúla og Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðingur.

### Pallborð

Óluva Zachariassen var orðstýrari hendan dagin, og var tað somuleiðis hennara uppgáva at stýra pallborðskjakinum. Sjey luttakarar vóru við borðið: Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Føroya Pedagogfelag, Ann-Elisabeth Joensen, leiðari Frítíðarskúlin í Hornabø og næstformaður í Pedagogfelagnum, Johannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelag, Elin Lindenskov, býráðslimur í Tórshavn, Heðin Mortensen, formaður í Mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu, Mia Pedersen, varaborgarstjóri í Vestmanna kommunu og forkvinna í Føroya Kommunu-

Framhald á síðu 8